# Frásøgn um samfelags-ábyrgd 2017

BANKNORDIK

# Frásøgn um samfelagsábyrgd í BankNordik

At taka samfelagsábyrgd er ein inngrógvin liður í strategiini hjá BankNordik at skapa virði fyri allar samtaksins áhugapartar. Umframt at skapa eitt búskaparligt virði gjøgnum effektivt og ábyrgdarfult banka- og tryggingarvirksemi við teimum tænastum, sum vit bjóða kundum okkara, og við okkara serkunnleika innan fíggjarliga ráðgeving, so hevur BankNordik-samtakið eisini sum mál at skapa sosial virði í teimum nærsamfeløgum, sum samtakið er partur av. Í BankNordik eru vit av teirri grundáskoðan, at samfelagsábyrgd verður tikin umvegis virksemi, sum eisini kann vera eitt positivt íkast í einum handilsligum samanhangi, og sum á tann hátt kann sampakka við grundleggjandi handilsskap og strategi bankans. Tí eru átøkini, sum BankNordik er partur av, strategiskt rótfest í virðum, visjón og strategi samtaksins.

Havandi í huga søguliga íkastið hjá BankNordik til nærsamfelagið og áhaldandi ynskið um at gera ein veruligan mun fyri kundar og starvsfólk okkara, tekur BankNordik samfelagsábyrgd við denti á hesi trý øki:

- Kundarnir
- Starvsfólkini
- Nærsamfelagið

Tað hevur stóran týdning fyri BankNordik, at átøkini innan samfelagsábyrgd eru ítøkilig, effektiv og viðkomandi fyri okkum sum fíggjarstovn við virksemi í trimum norðurlendskum londum. Tað merkir, at átøkini skulu vera ásýnilig og taka hædd fyri teimum sosialu og mentanarligu bygnaðum, sum eyðkenna tey nærsamfeløg, ið BankNordik er virkin í.

# Dentur á langskygd kundasambond

Í dagsins alsamt meiri skiftandi og tíðum fløkta samfelag leggur BankNordik seg eftir at seta kundan í miðdepilin og menna varandi kundasambond við støði í ábyrgd og sínámillum áliti, sum gagnar báðum pørtum. Av tí at tað einstaka kundasambandið er grundarlagið undir okkara handilsskapi, er kundin ein natúrligur liður í samfelagsábyrgd bankans.

**Økt kundanøgdsemi í bankanum**

Í 2017 legði BankNordik serligan dent á at menna og styrkja persónliga sambandið við kundarnar til tess at fáa eina betri fatan av tørvinum hjá kundunum. Úrslitið av hesum arbeiði verður mátað við einum sonevndum ‘Net Promoter Score’, sum regluliga verður dagført og gevur ábendingar um, hvussu sinnaðir kundar okkara eru at viðmæla bankan til onnur. Afturboðanirnar frá kundunum geva innlit í, hvør heildarupplivingin av bankanum er og kunnu harumframt staðfesta møguligar veikleikar á ávísum tænastuøkjum. Svarini frá viðskiftafólkunum verða umroknað til eitt NPS-vísital, ið bankin kunnger á sínum intraneti. Á einum stiga frá -100 til +100 er samlaða NPS-vísitalið hækkað við 5 stigum, síðani bankin í februar 2017 fór undir at gera mátingar og fram til desember 2017. Bankin hevur serliga lagt doyðin á at bøta um upplivingina hjá viðskiftafólkunum í Danmark, og tí er tað gleðiligt at kunna staðfesta eina hækking á 10 stig á NPS-stiganum á danska marknaðinum í sama tíðarskeiði.

Umframt NPS-skipanina tekur samtakið stig til eina árliga kundanøgdsemiskanning, ið mátar trúfestið, ið kundar sýna BankNordik. Kanningin í 2017 varð framd av Finansektorens Uddannelsescenter við luttøku av 701 privatkundum og 52 vinnukundum. Frá privatkundum fekk bankin skotsmálið 75 av 100 stigum samanborið við 67 stig í 2016. Vinnukundar góvu bankanum 76 stig, ið er tað sama sum árið fyri.

Bankin gevur eisini greiningum gætur, sum triðipartar gera, og vit kýta okkum at væla um tey øki, sum krevja ábøtur. Á donsku heimasíðuni Trustpilot.dk, ið gevur brúkarum møguleika at ummæla tænastur og veitingar hjá fyritøkum, fær BankNordik javnan ummæli frá kundum sínum. Hetta er eitt gott høvi hjá bankanum at fáa innlit í hugsan og meiningar hjá kundunum, og tað gevur møguleika fyri at bøta um viðurskifti, tá ið kundar siga seg hava havt eina minni góða uppliving í BankNordik. Sí viðmælini á Trustpilot her.

**Ráðgeving, sum er løtt at skilja**

Lyftið hjá BankNordik til kundarnar er at veita persónliga ráðgeving, sum ger tað lætt at velja rætt. Hendan strembanin eftir at veita ta bestu ráðgevingina krevur, at førleikastigið hjá ráðgevunum er høgt. Tí leggja vit okkum støðugt eftir at útbúgva okkara ráðgevar, so teir altíð eru førir fyri at veita skraddaraseymaða ráðgeving, sum hjálpir tí einstaka kundanum at hava tamarhald á egnum búskapi.

**Privatbúskaparlig ábyrgdarvitska**

Ein sunnur privatbúskapur hevur stóra ávirkan á, hvussu einstaklinginum veit við. Tí sær BankNordik tað sum sína skyldu at eggja til ábyrgdarfulla búskaparliga atferð og støðutakan. Tá ið kundin tekur ábyrgd av egnum fíggjarviðurskiftum, gagnar tað báðum pørtum. Gjøgnum okkara samskiftisrásir eggja vit kundunum til ábyrgdarvitsku, og tað er ein ítøkiligur partur av strategiini hjá samtakinum fyri sosialu miðlarnar at veita kundunum henta kunning, sum vegleiðir og kunnar um fíggjarlig hyggjuráð og fyrilit. Finn BankNordik á Facebook í Føroyum, Danmark og Grønlandi.

## Starvsfólkamenning og -nøgdsemi

Starvsfólkini eru tað virðismiklasta tilfeingið, sum BankNordik eigur, og tí er tað sera týdningarmikið, at bankin megnar at varðveita og draga at sær dugnalig og eldhugað starvsfólk, sum hava áræði og førleika at reka eina virðisskapandi fíggjarfyritøku. Tí vilja vit skapa fortreytirnar fyri einum góðum og avbjóðandi arbeiðsumhvørvi gjøgnum støðuga førleikamenning og trivnaðartiltøk. Vit ásanna, at tað hevur stóran týdning, at okkara starvsfólk hava eina sunna javnvág millum arbeiðslív og privatlív, og vit eru tilvitað um, at trivnaðurin og heilsan hjá starvsfólkunum eru av størsta týdningi, um BankNordik-samtakið skal vera kappingarført í fíggjargeiranum í framtíðini.

**Starvsfólkamenning leggur lunnar undir framtíðar vinningsføri**

Eitt høgt førleikastig í starvsfólkahópinum er avgerandi fyri, at BankNordik framhaldandi kann røkka góðum handilsligum úrslitum. Tí virka vit alsamt fyri at menna okkara menniskjatilfeingi til tess at tryggja tilverugrundarlagið hjá bankanum og bøta um framtíðarmøguleikarnar hjá tí einstaka starvsfólkinum. Hvørt ár setur bankin eina munandi upphædd í at útbúgva nýggj starvsfólk og í eftirútbúgving, m.a. næmingaútbúgvingina og HD, 1. part, sum allir atstøðingar verða eggjaðir til at taka. Umframt at styrkja hegnið hjá starvsfólkunum og skapa ein betri dynamikk í starvsfólkahópinum, so vísa okkara royndir, at hesi útbúgvingar- og menningarátøk hava eina jaliga ávirkan á varðveitsluna av starvsfólkunum í BankNordik.

Við árslok 2017 hevði BankNordik-samtakið:

- 16 lærlingar
- 25 starvsfólk undir eftirútbúgving

Harumframt luttóku allir 45 leiðararnir í samtakinum á einum leiðsluskeiði við tí fyri eyga at styrkja yvirskipaðu leiðsluevnini í samtakinum.

**Vaksandi starvsfólkanøgdsemi**

Fyri at kunna draga at sær dugnalig starvsfólk og varðveita hesi í samtakinum er tað týdningarmikið at tryggja eitt nøktandi starvsfólkanøgdsemi. Árliga mentanarmátingin, sum eggjar stavsfólkunum til at siga sína hugsan um ymisk viðurskifti í samtakinum, gav eina ábending um, at nøgdsemið í BankNordik er styrkt frá 2016 til 2017.

Mentanarmátingin, sum ein óheftur veitari hevur framt, gevur m.a. eina mynd av, hvussu sterk virkismentanin er, hvussu væl fyritøkan livir upp til egin virði, og hvørji tiltøk eiga at verða raðfest í framtíðini. Úrslitið í 2017 var 4,15 eftir stiganum 1-5 samanborið við eitt úrslit á 3,9 í 2016, og tað meta vit vera nøktandi.

**Fjølbroytni á arbeiðsplássinum**

Við atliti at leiðslusamansetingini er tað yvirskipaða atlitið hjá bankanum at tryggja, at tað eru tey, sum á sínum ábyrgdarøki hava teir bestu førleikarnar at taka sær av dagligu leiðsluni, sum manna leiðsluna. Av tí sama er tað sera týdningarmikið, at styðjað verður upp undir eitt opið og fevnandi arbeiðsumhvørvi, har alt starvsfólkatilfeingið verður gagnnýtt í tráanini eftir at styrkja handilsligu avrikini hjá BankNordik við einari fjølbroyttari starvsfólkasamanseting. Tí stendur tað øllum starvsfólkum bankans, uttan mun til kyn, í boði at gagnnýta sínar førleikar á bestan hátt við javnbjóðis møguleikum fyri yrkisleið og leiðslustørvum.

Í einari vinnu, har javnvágin millum kynini er ein yvirskipað avbjóðing, sótu kvinnur í 37% av leiðandi størvunum í BankNordik-samtakinum við árslok 2017. Hetta er ein lítil afturgongd í mun til árslok 2016, tá ið kynsbýtið á leiðslustigi var 40 prosent kvinnur og 60 prosent menn. Stevnumiðið hjá bankanum er, at hvørki kynið skal vera undirumboðað við eini javnvág, sum er minni enn 40 prosent í mun til 60 prosent.

**NordikKompetance**

*NordikKompetence* er ein innanhýsis starvsfólkamenningarskipan, ið tvinnar saman starvsfólkamenning og nýskapan í eini roynd at menna nýggj hugskot, sum kunnu vera við til at betra um raksturin í samtakinum. Soleiðis sleppur NordikKompetence evnaríkum starvsfólkum at samstarva í toymum tvørtur um landamørk um at menna nýskapandi og virkisfremjandi loysnir, ið kunnu skapa virði fyri samtakið. Hetta kann vera alt frá tænastumenning, betri kundaupplivingum ella smidligari arbeiðsgongdum í samtakinum. Hvørt ár taka nýggj starvsfólkatoymi lut í NordikKompetence og kýta seg at skapa hugskot og fremja nýskapan, ið kann vera við til at bera samtakið fram á leið. Umframt toymisarbeiðið, so møtast luttakararnir hvønn ársfjórðing til skeiðsvirksemi undir kønari leiðslu av uttanhýsis ráðgevum.

## Menning av nærsamfelagnum

Gjøgnum alla sína meira enn 100 ára longu søgu hevur BankNordik havt djúpar røtur í nærsamfelagnum og givið sítt íkast til ta sosialu, mentanarligu og búskaparligu menningina, har bankin hevur verið virkin. Nú samtakið hevur vaksið um virksemið í Norðurlondum, leggur BankNordik seg í sama mun eftir at stuðla tiltøkum, ítróttafeløgum og mentanarlívi í teimum nærsamfeløgum, sum bankin virkar í.

# Menning av nærsamfelagnum

Gjøgnum alla sína meira enn 100 ára longu søgu hevur BankNordik havt djúpar røtur í nærsamfelagnum og givið sítt íkast til ta sosialu, mentanarligu og búskaparligu menningina, har bankin hevur verið virkin. Nú samtakið hevur vaksið um virksemið í Norðurlondum, leggur BankNordik seg í sama mun eftir at stuðla tiltøkum, ítróttafeløgum og mentanarlívi í teimum nærsamfeløgum, sum bankin virkar í.

**Stuðul og stuðulsavtalur**

Ásannandi tann avgerandi týdningin, sum mentanar- og ítróttafeløg hava fyri savningarmegina í samfelagnum, hevur BankNordik søguliga stuðlað alskyns framtakssemi í nærsamfelagnum. BankNordik raðfestir mentanarfeløg, ítróttafeløg og annað framtakssemi við breiðum útboði og limum í øllum aldri. Stuðulin skal gagna báðum pørtum, og endamálið skal sampakka við virðisgrundarlagið hjá BankNordik, sum byggir á grundvirðini: dugnasemi, eldhuga og framsøkni. Í 2017 stuðlaði BankNordik framtakssemi í nærsamfelagnum fyri umleið 3,1 mió. kr., býttar soleiðis sum grafurin niðanfyri vísir.






BankNordik og Samvinnan, ið er áhugafelagið fyri føroysk lesandi á Copenhagen Business School, gjørdu eina tvey-ára samstarvsavtalu í 2017. Avtalan styrkir grundarlagið hjá Samvinnuni og er við til at menna stevnumiðið hjá felagnum at virka fyri at knýta tey lesandi tættari at føroyska vinnulívinum.



Í september 2017 var BankNordik vertur fyri einum útisetakvøldi í Keypmannahavn. Á skránni var kunning til lesandi útisetar frá Føroyahúsinum, Ráðgevingini, BankNordik og Samvinnuni.



BankNordik er errin høvuðsstuðul hjá føroyska U21 hondbóltslandsliðnum, sum spældi seg víðari úr bólkaspælinum í HM-endaspælinum í Algeria í juli 2017. Myndin er frá eini vitjan í BankNordik, áðrenn liðið legði leiðina móti Algeria.

**BankNordik stuðlar arbeiðnum hjá KRIS**

Í juni 2017 skrivaði BankNordik undir eina tríára stuðulsavtalu við KRIS, sum er ein hjálparfelagsskapur fyri kvinnur og menn yvir 18 ár, ið hava verið fyri kynsligum ágangi. Stuðulsavtalan hevur eitt virði á uml. 500.000 krónur og er viðvirkandi til, at KRIS nú hevur fingið egið tilhaldsstað. Høvuðsvirksemið hjá KRIS er persónlig ráðgeving, sjálvhjálparbólkar, upplýsing og skeiðsvirksemi, og í hesum sambandi hevur tað stóran týdning, at felagsskapurin hevur góð og trygg hølisviðurskifti at virka í. Við stuðulsavtaluni fegnast BankNordik um at vera við til at styrkja arbeiðið hjá felagsskapinum.



Beinta M. Petersen, forkvinna í KRIS, Árni Ellefsen, forstjóri í BankNordik, og Gvøðbjørg West, nevndarlimur í KRIS.

**Lestrarstuðul til grønlendsk lesandi**




Í 2017 fór ein nýggj stuðulsskipan hjá BankNordik fyri ungar grønlendingar undir hægri bókligum lesnaði ella yrkislesnaði av bakkastokki. BankNordik letur eina árliga stuðulsupphædd á samanlagt kr. 100.000. Stuðulsupphæddin verður latin tvær ferðir um árið til tvey lesandi, sum fáa kr. 25.000 hvør.

Eftirspurningurin eftir skikkaðari arbeiðsmegi í Grønlandi er størri enn útboðið, og tí fer eitt styrkt útbúgvingarstøði at vera við til at lyfta førleikarnar hjá arbeiðsmegini til frama fyri grønlendska búskapin. Harumframt styrkir útbúgving møguleikarnar hjá tí einstaka at skapa eina spennandi og avbjóðandi lívsleið. Hetta eru høvuðsorsakirnar til, at BankNordik hevur sett í verk eina stuðulsskipan, hvørs íkast hjálpir ungum grønlendingum undir útbúgving at fáa endarnar at røkka saman.

**Vinnulívsfólk royndu seg saman við miðnámsnæmingum**



Í november 2017 skipaði BankNordik fyri einum felags tiltaki fyri handilsskúlanæmingar og vinnulívsfólk, ið luttóku í virkispælinum Business Combat. Næmingar og vinnulívsfólk vórðu býtt í bólkar og kappaðust hvør ímóti øðrum um at reka eina uppspunna fyritøku í einum eftirgjørdum vinnulívsumhvørvi. Við hesum fingu næmingarnir roynt ástøðina undir veruleikakendum umstøðum við íkasti frá fólki við drúgvum vinnulívsroyndum. Harafturímóti fingu vinnulívsfólkini møguleikan at menna síni evni at taka handilsligar avgerðir í samstarvi við ungar og ágrýtnar næmingar við øðrvísi hugskotum og áskoðanum. Undirvísing gjøgnum spæl er lærufremjandi og gevur fjølbroytni í gerandisdegnum hjá næmingunum, og hetta varð endurspeglað í jaligu afturmeldingunum frá luttakarunum.

**Tá ið vinna og mentan ganga hond í hond**

Í januar 2017 gjørdist BankNordik høvuðsstuðul hjá Norðurlandahúsinum. Við avtaluni gjørdist bankin ein virkin luttakari í arbeiðnum hjá Norðurlandahúsinum at stuðla norðurlendskari mentan og list. Avtalan er eisini í samsvari við tráan bankans eftir at virka fyri einum fjølbroyttum samfelagi, ið er sermerkt fyri sítt sterka tilknýti til norðurlendsku grannar okkara. Samstarvið við Norðurlandahúsið heldur fram til árslok 2018.

**BankNordik-savnið av bakkastokki**

Í 2017 stovnaði bankin BankNordik-savnið og gav savninum 626 listaverk í gávu. Savnið skal umsita, varðveita og sýna fram tey mongu listaverkini, sum bankin hevur keypt gjøgnum árini, umframt menna listasavnið og føroyska list. Endamálið hjá savninum er m.a. at:

- eiga, røkja og menna listasavnið
- skipa fyri framsýningum og læna listaverk út
- samstarva við privatar og almennar stovnar um framsýningar
- menna føroyska listaumhvørvið

Umframt at lata grunninum listaverk fyri eitt mett virði á 5 mió. kr., so letur BankNordik eisini eina millión krónur til rakstur av grunninum í tíðarskeiðnum fram til 2020. Nevndin í grunninum hevur fingið stovnsraksturin um hendi, og inntøkur stovnsins skulu eitt nú stava frá framsýningum og øðrum tiltøkum, útleigu av listaverkum og øðrum til almennar og privatar stovnar.

Felagið Føroysk Marknaðarfólk lat í 2017 BankNordik heiðurin 'ársins sosiala tiltak' fyri at hava sett í verk BankNordik-savnið.

## Mál og reglur

Hóast BankNordik tekur undir við endamálunum og fylgir meginreglunum fyri altjóða átøk innan samfelagsábyrgd, t.d. UN Global Compact, so hevur bankin ikki valt formliga at eftirlíka tílíkum reglum, av tí at virksemi okkara er staðbundið í Norðurlondum. Av somu orsøk er arbeiðið hjá BankNordik við samfelagsábyrgd heldur ikki skipað við formligum mannagongdum viðvíkjandi umhvørvi og mannarættindum, tó at vit sjálvandi altíð royna at leggja upp fyri hesum í okkara handilsliga framferðarhátti.